


sansir.fo

Endabrestur í Íløguspælinum

# Virðislønir og tónleikur í Miðlahúsinum

Eik Banki og Sosialurin skipa fyri, at vinnararnir í Íløguspælinum verða kosnir, og virðislønir verða handaðar í Miðlahúsinum mánakvøldið 14. januar.

Tá verður kunngjørt, hvør hevði nervarnar og evnini at vinna Íløguspælið. Hvør dugdi at halda høvdið kalt og støðugt gera bestu íløgurnar farnu 4 mánaðirnar? Besti íleggjarin vinnur heilar 50.000 kr., meðan næstbesti og triðbesti íleggjarin vinna ávikavist 25.000 og 10.000 kr.

Kom oman í Miðlahúsið mánakvøldið. Tað verður eitt hugnaligt kvøld við spennandi framløgum, leskiligum sjálvtøkuborði og tónleiki við Tróndi Enni og Niel Joensen.

19.00 Tiltakið byrjar
19.15 Jan Müller frá Sosialinum bjóðar vælkomin.
19.30 Sverri Justinussen, leiðari á Eik Markets, hevur stutta framløgu um íløgur
19.45 Jákup Petur Bærentsen, leiðari á Eik Asset Management, greiðir frá Íløguspælinum
20.00 Vinnararnir verða heiðraðir

www.ilogur.com Sosialurin Eik